# Amerada Hess ger klárt



*Í eina góða viku hava vitjandi í SMS havt møguleika at síggja modell av stóra boripallinum Sovereign Explorer, sum Transocean eigur. Modellið verður at síggja til leygardagin.*
*Mynd Jens K Vang*

OLJULEITING
*Jan Müller*

Nú tað gongur móti endanum á teimum báðum fyrstu boringunum á føroyska landgrunninum er triðja oljusamtakið við Amerada Hess á odda farið at gera klárt til sína fyrstu boring. Hesar seinastu dagarnar er nógv útgerð so sum borirør, tilfar av ymsum slag o.a. komið til Runavíkar, har tað verður at liggja í nakrar vikur.

Hjá Amerada Hess bíða teir eisini við spenningi eftir úrslitinum av teimum báðum boringunum hjá Statoil og BP. Fyri Hess hevur tað alstóran týdning, at Statoil heldur tíðarætlanina, tí tað skal brúka sama boripallin, Sovereign Explorer. Miðjað verður móti at kunna byrja boringina tíðliga í september. Hetta er eisini avgerandi, tí samtakið skal bora í einar tveir mánaðir ella so og helst skulu vit ikki koma ov langt út á veturin, áðrenn boringin er liðug.

Tað er eingin loyna, at tað kann koma The Faroes Partnership-samtakinum væl við, at tvær boringar hava verið, áðrenn tað fer at bora. Tað er nevniliga ikki óvanligt, at oljufeløg lata upplýsingar til onnur, sum fara at bora í sama øki. Tvs. at Amerada Hess kann fáa týðandi upplýsingar frá Statoil og BP um teirra brunnar og hvussu løgini síggja út teir 4-5 kilometrarnar niður í undirgrundina. Antin olja verður funnin ella ikki, so kunnu slíkir parametrar hava týdning fyri eina nýggja boring.

Sosialurin skilur annars, at tað gongur eftir ætlan hjá bæði Statoil og BP. BP vil helst røkka endaliga máli sínum einaferð í næstu viku. Statoil vil røkka mál síni í næstu og í aðru viku gongst eftir ætlan. Framvegis verður einki upplýst úrslitið av boringunum. Fylgja vit tí sannlíkinum fyri at finna olju og hesi framvegis halda, so peikar fingurin niðureftir, tí seinlíkini fyri ikki at finna nakað eru størri enn fyri at gera fund.

# Royking kostar barnalív

**Ein kanning á Århus Universitetshospital staðfestir, royking millum barnakonur kostar lív**

KANNING
*Eyðun Klakstein*

Lótu allar barnakonur í Danmark verða við at roykja, so hevði fjórðahvørt deyðfødda barn komið til verðina á lívi, og fimta hvørt deyðsfall millum smábørn undir eitt ár hevði ikki komið fyri.

Tað vísir ein nýggja kanning, sum er gjørd á Universitetshospitalinum í Århus, og sum er almannakunngjørd í American Journal og Epidemiology.

Granskararnir í Århus hava kanna 25.000 barnakonur, og teir hava fyri fyrstu ferð nakrantíð staðfest illgrunan um, at royking kostar lív. Í Danmark er talan um eini 150 barnalív um árið.

– Hetta er ein ómetaliga týdningarmikil boðskapur. Summar mammur siga, at børnini verða lættari, um tær roykja, og tað gevur eina lættari føðing. Men tað vísir seg tíverrri, at royking er lívsvandamikil, sigur læknin Kirsten Wisborg, leiðari fyri granskingararbeiðið.

Granskararnir hava samanlíknað tøl fyri roykjandi og ikki-roykaandi kvinnur, sum hava verið við barn, frá 1989 til 1996, og tað eru hesi tøl, sum granskingin byggir á.

